SUNDA KOMMUNA

# Á Dagstovninum við Stórheygg

eru hesi størv leys at søkja

**Tvey pedagogstørv**
- Ein pedagogur til eina stovu við børnum í aldrinum 2-3 ár, 34 t/v at byrja 1. februar 2008 ella eftir nærri avtalu.
- Ein pedagogur á barnagarðsstovu, 30 t/v at byrja 1. februar 2008 ella eftir nærri avtalu.

**Tvey barsilstørv**
- 35 t/v, á eini stovu við børnum í aldrinum 2-3 ár, í tíðarskeiðinum 1. februar 2008 til 1. september 2008,
- 30 t/v, á eini vøggustovu, í tíðarskeiðinum 1. mars 2008 til 1. september 2008.

**Eitt starv sum stuðul**
15 t/v at byrja 1. februar 2008.

**Vit ynskja, at tú hevur**
- hug at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnunum
- virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teim vaksnu
- hug til at skapa og seta dám á dagstovnin
- góð samstarvsevni og kann arbeiða sjálvstøðugt

**Vit bjóða**
- eitt spennandi arbeiðspláss, har pláss er fyri ymiskleika
- ein stovn í er í støðugari menning
- eitt arbeiðspláss, har tú kemur at hava ávirkan

**Setunarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til**
- Dagstovnin við Stórheygg: Sunnrid Poulsen, leiðara, á tlf. 772020 ella 472020

Umsóknir við avritum av prógvi v.m. skulu sendast beinleiðis til

Dagstovnin við Stórheygg
Áarvegur 3
420 Hósvík
ella við telduposti til: storheygg@sunda.fo

**Umsóknir mugu vera dagstovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. januar 2008.**

Í Sunda kommunu eru tríggir dagstovnar: á Oyrarbakka, í Hvalvík og í Hósvík. Dagstovnurin við Stórheygg í Hósvík hevur pláss fyri 58 børnum, og har eru í løtuni 11 starvsfólk. Leiðararnir á teimum trimum dagstovnunum hava eitt gott og tætt samstarv í samráð við kommununa.

Bláí Krossur
BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS

# Samskipari søkist

Sjálvstøðugt og avbjóðandi starv hjá Bláa Krossi Føroya.

Vit sóknast eftir einum sjálvstøðugum og ágrýtnum starvsfelaga, sum kann arbeiða á ymiskum økjum og vera við til at menna felagsskap okkara.

**Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a. um:**
- Samskipa og standa fyri ymiskum verkætlanum, serliga innan fyribyrgingarøkið.
- Standa fyri og leggja til rættis kunningararbeiðið hjá Bláa Krossi.
- Menna sjálvbodna arbeiðið hjá Bláa Krossi.
- Saman við aðalskrivaranum tryggja fíggjarliga grundarlagið hjá felagsskapinum.
- Hjálpa til við fyrifallandi uppgávum.

**Førleiki:**
- Tú ert væl skipað/ur og hevur gott yvirlit, hóast nógvir bóltar eru í luftini ísenn. Tær dámar at arbeiða saman við øðrum, men kanst eisini arbeiða sjálvsstøðugt og leggja tín egna arbeiðsdag til rættis.
- Vit roknað við at tú hevur eina hóskandi útbúgving ella royndir á økjunum.
- Tú dugir væl føroyskt og hevur hollan teldukunnleika.
- Royndir frá verkætlanararbeiði og/ella fjølmiðlaøkinum er ein fyrimunur, men eingin treyt.
- Tú tekur undir við grundarlagnum hjá Bláa Krossi og vilt arbeiða samsvarandi hesum.

Tú verður ein partur av toyminum á skrivstovuni í Runavík og kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við hini starvsfólkini á skrivstovuni. Talan er um fulltíðarstarv, men kann parttíðarstarv eisini koma uppá tal. Góðir møguleikar eru fyri persónligari og fakligari menning. Lønar- og setanarviðurskifti eftir avtalu.

Vit skulu hava umsókn tína seinast fríggjadagin 25. januar. Starvið verður sett skjótast til ber.

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú ringja til Hjalmar á tlf. 748894 ella senda teldupost til hjalmar@blakross.fo. Umsókn skal sendast til:

**Bláí Krossur Føroya**
Heiðavegur 6
620 Runavík.

Lær at skriva føroyskt!
www.kennarin.dk

# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir einum stuðulsfólki til 5 ára gamalt barn við serligum tørvi í Porkeris kommunu at byrja 1. februar 2008 ella so skjótt sum gjørligt.

Stuðulin kemur í samstarvi við Sosialu deild, NSR tænastuna í Suðuroy og familjuna, at stuðla barninum í at fáa ein innihaldsríkan og mennandi dag.

Vit ynskja, at tann, ið skal setast, hevur hóskandi útbúgving og royndir.

Arbeiðið er fulla tíð og verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfelag.

Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at venda tær til Annu Djurhuus, sosialdeildarleiðara tlf. 37 36 04.

Umsóknin við prógvum og møguligum viðmælum skal sendast inn Porkeris Kommunu att. Sosiala deild í seinasta lagi 14. januar 2008 kl.12.00.

**Sosiala Deild**
**Porkeris- og Vágs Kommuna**
**Við Á 8 · 950 Porkeri**
**Tlf 37 36 04 · Tlf 22 67 04**
**T-postur: sosialadeild@email.fo**



## Hýruvognsloyvi

Í Tórshavnar kommunu er tvey hýruvognsloyvi leyst at søkja.

Vísast skal á, at sambært grein 8 í reglugerðini um hýruvognsstøðir í Tórshavnar kommunu, skulu umsøkjarar hava váttan fyri, at teir koma at koyra frá støð. Loyvini er tengd at bilstøðini BIL.

Umsóknarblað fæst í Snarskivuni. Umsóknir skulu vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 18. januar 2008.

Tórshavnar kommuna